oyggjaleikir

# Oyggjaleikir í

**Besta føroyska oyggjaleikalúrtøkan nakran tíð kom til høldar í ringast fyriskipaðu oyggjaleikunum nakrantíð. Við 24 gullmerkjum stóðu Føroyar næst ovast á listanum, tá samlaða heiðursmerkjabýtið varð talt saman, og tí gjørdist talan um nógvar ógloymandi løtur í mongu hitastigunum á griksku feriuoynni. Myndamður okkara, Álvur Haraldsen, fangaði nógvar av løtunum í linsuni, og á hesum síðum hava vit valt nakrar teirra út.**



Eingin yvir og eingin við síðuna. Føroyska kvinnustafettin gjørdi fullkomuliga bart í svimjihylinum, har tær settu nýtt oyggjaleikamet á øllum stafett-teinunum hjá kvinnunum




Finalan varð tapt, men tað merkti ikki at alt var tapt. Og hóast kossurin ikki varð gyltur hesaferð, so mundi Jóhan Petur á Stongum fegnast um stuðulin, sum varð veittur honum og liðnum til tað seinasta



Fittur var hann. Lítla reinsdjórið, Rhodelios, sum var maskottur á oyggjaleikunum. Hjá føroyingunum mundi tað vera ríkiliga heitt, hóast fólk vóru nakin yvir beltið, men Rhodelios tóktist tó stórtrívast í sólini, sum hann eisini er uppkallaður eftir